# Mr. Supertramp á Summar Festivalinum


Roger Hodgson

**Í morgunsendingini í Útvarpi Føroya í morgun almannakunngjørdi Summar Festivalurin, at sangarin og sangskrivarin handan størstu hittini hjá Supertramp, Roger Hodgson verður eitt av høvuðsnøvnunum á ársins festivali**

FESTIVAL SUMMAR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Supertramp var síðst í 70'unum og fyrst í 80'unum sera vælumtóktur bólkur millum tannáringar í Føroyum. Nú næstan 30 ár seinni sleppa føroyingar endiliga at uppliva ein bita, av Supertrampinum, hetta hendir tá Summar Festivalinum bjóðar eyðkendu sangrøddina hjá Roger Hodgson á pallin. Røddin hevur ljómað úr Útvarp Føroya og nógvum túsund øðrum útvarpsstøðum kring allan heim nógvar milliónir ferðir seinastu 30 árini, á Supertramp løgum sum Logical Song, Give a Little Bit, Dreamer, Take the Long Way Home, Breakfast in America, School og It's Raining Again.

### Góð ummæli

Roger Hodgson kemur í august við bólki sínum til Klaksvíkar at geva klaksvíkingum og gestum teirra eina framúrskarandi tónleikaupplívíng, um ummælini uttan úr heimi eru eftirfarandi. Tað skilst eisini, at tað er Supertramp tónleikurin, ið eigur største partin av hansara spæliskrá. Hetta hóast hann sum einstaklingur hevur givið hópin av fløgum út, síðan hann fyri 23 árum síðan fór úr Supertramp.

### Gav eitt sindur

Hodgson gav í 2000 fløguna "Open the Door" út,. Henda fløgan varð sera væl móttikin, best gekk í Sveits, har hon lá ovast á sølulistanum í tríggjar vikur. Síðan hetta er eingin heil fløga komin út, men Roger Hodgson gjørdi aftur í 2004 vart við seg, tá hann gav gamla Supertramp sangin Give a Little Bit til tey, ið vóru rakt av risaflóðalduni í fjareystri.. Hetta lag gjørdist sera nógv spælt serliga í USA.

### Betri enn nakrantíð

Roger hevur livað eitt friðarligt og hampiligt lív seinastu 23 árini. Hann er givin at drekka og heldur seg kropsliga væl fyri. Hetta hoyrist eisini aftur á sanginum, røddin ljóðar betri enn nakrantíð áður, skriva ummælararnir millum annað. Børnini eru nú vaksin, konan og hann eru farin frá hvør øðrum, so nú verður mesta orkan nýtt til konsertferðir kring allan heim.

### Var við til at stovna Supertramp

Roger Hodgson stovnaði Super Tramp saman við vinmanninum Rick Davies í 1969, upprunaliga spældi hann bass, men skifti í 1971 bassin út við gittaran.

Í 1974 fekk bólkurin sítt stóra gjøgnumbrot við lagnum hjá Roger Hodgson "Dreamer", ið var við til lyfta plátuna "Crime of the Century" ovast á bretska sølulistan. Bólkurin var ein tann best umtókti bólkurin í Evropa í seinnu helvt av sjeyti árunum.

### 50.000.000 seldar plátur

Í 1979 kom plátan Breakfast in America út. Hon lá ovast í hittlistunum alt árið og telist millum best seldu fløgur nakrantíð. Henda pláta er ein tann største orsøkin til, at Supertramp samanlagt hevur selt 50 milliónir fløgur.

### Heim til børnini

Eftir 14 ár sum ein av oddamonnunum í Supertramp og sangskrivari aftan fyri størstu hittini hjá Supertramp, takkaði Roger Hodgson í 1983 fyri seg.

Hann vígdi lív sítt til familjuna. Hann vildi vera heima hjá børnunum, meðan tey vóru smá, ístaðin fyri at ferðast kring allan heim á risa konsertferðunum hjá Supertramp. Soleiðis mátti ein av heimsins best umtóktu bólkum lúta fyri friðarliga familjulívinum.

### Bygdi upptøkuhøli

Roger Hodgson bygdi sær upptøkuhøli í húsunum í Kalifornia. Her kundi hann arbeiða við tónleiki, meðan hann hevði børnini tætt hjá sær. Fyrsta úrslitið av hesum arbeiði var plátan "In the Eye of the Storm", ið kom út í 1984 og varð seld í 2 milliónum eintøkum.

Hesi árini síðan 1984 hevur Hodgson alla tíðina fingist við tónleik sum einstaklingur, saman við bólkinum Yes, saman við soninum Andrew og við fólki sum Andrea Bocelli, Brian Ferry og Al Jarreau. Hetta hevur havt fleiri fløguútgávir og nógvar konsertferðir við sær.

### Ljóðar av Supertramp

Supertramp helt somuleiðis fram við Rick Davies á odda, men bólkurin megnaði ongantíð at endurvinna plássið, sum ein av heimsins best umtóktu bólkum, bólkurin er ikki virkin í løtuni. Síðstu konsertirnar hjá teimum vóru hildnar í 2002, men sambært ummælarum ljóðar Roger Hodgson solo munandi meira sum Supertramp enn Supertramp ger. Hetta orsakað av eyðkendu røddini, ið vit kenna úr best umtóktu løgunum hjá bólkinum.

## Restorff og Vífilfell klár vi øldósum

**Føroyska Restorff og Vífilfell í Íslandi eru bryggjarí og eru farin í samstarv. Fyrsta úrslitið er, at tey eru klár at senda fyrstu føroysku øldósirnar á marknaðin, tá lógin loyvir hesum. Og stjórin í Restorff ivast ikke í, at lógarbroyting kemur**

ØL
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Bryggjaríini Restorff og Vífilfell hava framleitt fyrstu føroysku øldósirnar. Bryggjaríini hava gjort samstarvsavtalu og hetta er fyrsta úrslitið. Sostatt eru bryggjaríini klár, tá ætlaða lógarbroytingin, ið m.a. loyvir eingangs dósum, kemur í gildi.

Stjórin í Restorff, Johan Mortensen, ivast ikki í, at broytingin kemur.

– Broytingin kemur óivað, og vit eru klárir vi dósini, og bíða bara, til broytingin verður sett í gildi, sigur hann.

Hann fegnast um samstarvið við Vífilfell, ið er størsta fyritøka av sínum slag í Íslandi.

Vífilfell framleiðir t.d. Coca Cola og Fanta og eisini Carlsberg á licens.

Og tað er eisini Vífilfell, ið framleiðir Svali, sum føroyingar kenna væl.

Sum nakað av tí seinasta, so er Vífilfell eisini høvuðsstuðul hjá Jóansøkufestivalinum í ár.

Johan Mortensen á Restorff fegnast um samstarvið, ið hann sigur gevur stórar møguleikar fyri báðar partar, tí til ber at marknaðarføra saman og at framleiða hvør hjá øðrum, eins og talan er um øktan marknað.



*Føroyska øldósin er klár. Restorff og Vífilfell hava framleitt*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Roger Hodgson er ein ordans gloypibiti

**Summar Festivalurin hevur í Roger Hodgson fingið eitt tað tónleikanavnið, ið fyriskiparin, Steintór Rasmussen allar helst vil sleppa at hoyra.**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

"Hetta er triðja árið, at eg skipi fyri Summar Festivalinum, og hesaferð føli eg, at eg havi fingið ein ordiligan gloypibita" sigur Steintór Rasmussen um, at stóri festivalurin í Klaksvík hevur tryggjað sær fyrrverandi Supertramparan Roger Hodgson á ársins festival.

Steintór minnist Supertramp, sum ein av teimum bólkunum, ið hann dámdi allar best í 80'unum. "Teir vóru øgiliga stórir í Føroyum tá, og hóast man ikki hevur hoyrt so nógv til Supertramp seinnu árini. so eiga teir eitt stórt pláss í hjørtunum á fólki, ið eru á mínum aldri, eitt sindur yngri og eitt sindur eldri", heldur hann fram.

"Roger Hodgson var eitt slag av multigeniið í bólkinum, hansara rødd er ein so stórur partur av teirra ljóði, so vit føla, at hetta er, sum at fáa upprunaliga Supertramp at spæla. Hetta gleða vit okkum til."

Steintór sigur somuleiðis, at av tí, at Supertramp er ein so kendur bólkur í Føroyum, hevur festivalurin í rúma tíð, ætla sær at fingið Roger Hodgson henda vegin. Tá tey endiliga her fyri settu seg í samband við Hodgson, vísti hann seg at vera sera sympatiskur, og tí bar til, at fáa Føroyaferðina í lag.

Hodgson er á konsertferð í Evropa í juli og avgust, so Summar Festivalurin passaði væl inn í skránna.

### Ikki bert fyri tey gomlu

Higartil hevur Summar Festivalurin bert avdúkað The Rasmus fyri yngra fólki, meðan tvey stór útlendskt nøvn Shu-Bi-Dua og Roger Hodgson eru avdúkaði til teir eldru áskoðararnar, men Steintór sigur, at hetta ikki skal síggjast, sum um festivalurin ætlar sær at forsøma yngru áskoðararnar.

Hann sigur, at enn eru fleiri útlendsk nøvn, ið ikki eru avdúkaði og so eisini øll tey føroysku. Umframt okkurt fyri tey heilt yngstu.